# Mentanin heiðrað

**Tríggir høvundar, ein teknari og ein sjáldsom eldsál vórðu í gjár heiðrað, tá M.A.Jacobsens virðislønirnar og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs vórðu handaðar í gjár**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Munagóðar peningagávur og heiðurslønir til føroysk mentafólk hoyra til heldur sjáldsomu hendingarnar á føroyska mentanarpallinum. Tí var tað ein forkunnug løta, tá heili fimm føroysk mentafólk, umframt heiðurin, fingu hvør sín gávukekk á 35.000 krónir, tá M.A.Jacobsens virðirlønirnar og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs vórðu handaðar í Mullers Pakkhúsi í gjár.

### Skarað framúr

Uttan iva fullu virðislønirnar eisini á eitt turt stað, tí sum teknarin Hanni Bjartalíð lat heilsa úr Finlandi, tá hann fekk Barnabókaheiðurslønina

- Nú byrjar tað at líkjast eini mánaðarløn.

Eisini rithøvundurin Marjun S. Kjelnæs, ið eisini fekk heiðurslønina fyri barnabókmentir, minti á, at tað ikki er nokk, bara at frøast um slík avrik, tí uttan peningaligan stuðul og góðar arbeiðsumstøður ber illa til hjá rithøvundum og øðrum at halda á við sínum arbeiði.

Annars var løtan í Mullers Pakkhúsi eisini eitt fínt høvi at minna á, hvørji mentanar avrik hava skarað framúr á føroyska mentanarpallinum hetta seinasta árið.

Umfram Barnabókaheiðurslønir Tórshavnar Býráðs, vóru eisini tær tríggjar M.A. Jacobsens virðislønirnar handaðar í gjár.

Tað gjørdist Sólrun Michelsen, sum fekk M.A. Jacobsens virðisløn fyri fagrar bókmentir fyri bókina Tema við slankum, meðan M.A Jacobsens virðislønin fyri yrkisbókmentir fór til Hanus Kjølbro fyri bókina Veðurlæra. M.A. Jacobsens virðislønin fyri mentanaravrik fór í ár til Onnu Kirstin Thomsen fyri hennara virksemi í bygningunum hjá kongaliga einahandlinum á Tvøroyri



## Gevur mentanararvinum nýtt lív

Virðisløn M.A.Jacobsens fyri mentanaravrik í ár fór til Anna Kirstin Thomsen fyri kveikjandi virksemi hennara í bygningunum hjá Kongaliga einahandilinum á Tvøroyri

Í grundgevingini segði dómsnevndin millum annað, at Anna Kirstin er eldsálin, sum lívgar og ríkar, har hon virkar. Tað veri seg innan tónleik, undirhald, ella tá ið hon lærir fólk kring landið at dansa.

Við áhaldni og hugflogi, skynsemi og stórsinni hevur Anna Kirstin tikið stig til at umvæla, varðveita og lata upp dyrnar til ein týðandi part av mentanararvi okkara: bygningarnar hjá Kongaliga einahandlinum á Tvøroyri.

Um hesar karmar er sprottin ein søguligur og nútímans mentanarpallur og eitt livandi ungdómshús.

Her stíga føtur, ið undan fóru, inn aftur í ringin, og saman trína vit dansin inn í framtíðina.



## Sólrun Michelsen á egnum leiðum

Sólrun Michelsen fekk virðisløn M.A. Jacobsens fyri fagrar bókmentir 2008 fyri bókina Tema við slankum frá 2007.

Bókin er á nógvar mátar øðrvísi enn tað, vit annars síggja í føroyskum skaldskapi. Og høvundurin fjaldi heldur ikki yvir, at hon hevði havt ilt vit at meta um, hvørt hon var á rættari leið við bókini.

- Tí hevur hendan virðislønin nógv at siga fyri meg í tann mun at hon gevur mær áræði at halda fram, segði hon.

Og júst hetta, at høvundurin gongur sínar heilt egnu leiðir, taldi nógv í metingini hjá dómsnevndini, hvørs grundgeving ljóðaði soleiðis.

Sum fyrsta roynd høvundans at skriva til vaksin ber hendan skaldsøgan boð um, at føroyskar bókmentir við Sólrun eru á ótroddum leiðum. Í frásøgn um gerandisdagin hjá einari gentu í rembingar- og broytingartíðum í fimmtiárunum lýsir skaldsøgan modernaðu Føroyar frá einari síðu, sum vit ikki hava fingið lýsta áður. Sólrun letur fínliga í orð tað ósigiliga og viðbrekna, sum ofta verður skúgvað til viks og burturtrongt, tí tað er trupult at seta orð á og sárt at viðurkenna.

Samanumtikið hevur tað eydnast Sólrun Michelsen framúr væl at lýsa skuggasíðu mannalívsins í einum listaliga væl úr hondum greiddum verki við fjøltýddari søgugongd og mosaikkendari bygging.